## Ringur túrur

Ferðafólkini við norsku ferjuni ”Silvia Ana” fingu eina heldur baldruta ferð úr Hirtshals til Kristiansand fríggjadagin. Eftir ferðaætlanini eigur ferðin at taka hálvan triðja tíma, men tað vísti seg, at hon vardi fimm tímar. Orsøkin var, at tað var rættiliga frískur vindur av vestri, og tær seks metrar høgu aldurnar darvaðu skipinum, skriva norsk bløð. Tað skilst á bløðunum, at skipið rullaði illa, og at nógv ferðafólk høvdu ein ringan túr.



## Øll komu til tíðina

Tá Norrøna leygardagin skuldi úr Hantsholm, gjørdist neyðugt at framskunda fráferðina. Hetta tí veðurlíkindini ikki vóru av teimum bestu. Um 1300 fólk skuldu fáa boð um framskundaðu fráferðina, so tey á Smyril Line høvdu úr at gera við at fáa fatur á teimum, skuldu við. Sambært Útvarpinum, so gekk hetta tó upp á stás. Ikki minst tí bæði Útvarpið og Portalurin komu við áheitanum til fólk um at bera boðini víðari.

# Kirkjan yvirtikin

**Nógv fólk var komið saman í ólavsøkudag at hátíðarhalda, at Fólkakirkjan er yvirtikin**

FÓLKAKIRKJAN
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Í gjár, ólavsøkudag, yvirtók føroyska heimastýrið málsøkið Fólkakirkjan og onnur trúarsamfeløg. Hetta varð hátíðarhildið í Norðurlandahúsinum, har fleiri útlendskir gestir tóku lut. Eitt nú taldust norðurlendskir biskupar og formansskapurin í danska fólkatinginum millum tey innbodnu.

Tó varð einki umboð fyri danska kongshúsið til staðar.

Á samkomuni í Norðurlandahúsinum skrivaðu Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum og danski kirkjumálaráðharrin, Bertel Haarder, undir eina avtalu um samstarv í framtíðini.

Avtalan er um atgongd til at útbúgva og eftirútbúgva prestar og onnur starvsfólk á kirkjuøkinum, og um samstarv millum biskuparnar.

Avtalan er gjørd á tann hátt, at Mentamálaráðið kann útvega sær ta ráðgeving og hjálp frá danska Kirkjumálaráðnum, sum Mentamálaráðið hevur fyri neyðini.

Endaliga verður við avtaluni gjørd ein samstarvsnevnd á høgum stigi, ið fer at tryggja og menna samstarvið.

### Fjølbroytt skrá

Skráin var rættiliga umfatandi á hátíðarhaldinum. Millum røðararnar vóru Jóannes Eidesgaard, løgmaður, Bertel Haarder, kirkjumálaráðharri, og Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður. Kór Glyvra kirkju undir leiðslu av Meinhardi Bjartalíð og Kingobólkurin úr Tjørnuvík sungu. Ein av limunum úr Kingobólkinum, Jens Jensen greiddi eisini frá um kingosangin. Ólavur Jakobsen og Andrea Heindriksdóttir úr Aldubáruni spældu tvinni verk fyri guitar og tvørfloytu.

Harafturat vóru tríggir stuttir fyrilestrar hildnir á hátíðarhaldinum. Jákup Reinert Hansen, sóknarprestur, røddi um føroyska málið og føroysku kirkjuna, og tað kom meira enn ta einu ferðina, at fólk flentu, tá prestur skemtiliga fortaldi um orðaskiftið um føroyskt kirkjumál í gomlum døgum.

Jógvan Fríðriksson, sóknarprestur, hevði fyrilestur um ta føroysku sjómanskirkjuna, og brúkti hann serliga tað maritima myndamál at lýsa sítt evni.

At enda fekk Hans Jacob Joensen, bispur, orðið, har hann greiddi frá um føroyskar bíbliutýðingar. M.a. umrøddi hann eitt av aðalmálunum við siðaskiftinum um, at boðast skuldi á móðurmálinum. Í Føroyum varð tó ikki prædikað á móðurmálinum fyrr enn fleiri øldir seinni. Tó fingu vit heilar tvær týðingar av Bíbliuni.

Eftir hátíðarhaldið varð døgurði á Føroya Tele fyri innbodnum.



*Jógvan á Lakjuni og Bertel Haarder skrivaði undir samstarvsavtalu og tóku lógvatak í Norðurlandahúsinum*

# Rúmlig kirkja

**Jóannes Eidesgaard metir, at kirkjan skal verða rúmlig og savnandi. Hann ivast tó í, um løgmaður skal hava sama leiklut í kirkjuni sum danski monarkurin**

FÓLKAKIRKJAN
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

- Semjan millum politisku skipanina og kirkjuliga landslagið í Føroyum um ikki at fremja broytingar í sambandi við yvirtøkuna hevur helst verið orsøkin til, at almenna orðaskiftið um kirkjuna hevur verið tamt. Vit hava áður sæð, eitt nú á skúlaøkinum, at orðaskiftið gerst bæði livandi og viðkomandi, tá ið ábyrgdin fyri einum málsøki er okkara.

Hetta segði løgmaður á hátíðarhaldinum í Norðurlandahúsinum.

Hann segði seg vænta, at í komandi samgongum verður helst havt í huga, um avvarðandi landsstýrismaður er limur í Fólkakirkjuni, hóast hetta sambært stýrisskipanini ikki ber til at lógarfesta.

### Ikki sama leiklut sum drotningin

Hinvegin segði Jóannes Eidesgaard seg ivast í, um tað er rætt, at tann grundlógartryggjaða støðan hjá danska monarkinum sum yvirhøvd í donsku kirkjuni skal flytast inn í føroyskt lógarsmíð. Hann vísti á, at kirkjan helst skal skipa síni viðurskifti sjálv.

- Havandi í huga, at landsstýrismaðurin í mentamálum – og í ávísan mun løgmaður – skulu umsita kirkjuligu løggávuna í neyvum samráð við og hoyring av kirkjuligum pørtum, ivist eg í, um tað er rætt at flyta eitt søguliga treytað danskt grundlógarkrav um støðuna hjá monarkinum í eina nútíðar føroyska kirkjuløggávu. Hvørki landsstýrismaðurin ella løgmaður verða, og teir skulu heldur ikki verða, ein ovasti kirkjuligur leiðari, ið skal gera av trúar- og læruspurningar, segði løgmaður.

### Fyri øll

At enda segði løgmaður, at kirkjan í øldir hevur verið ein súla undir samfelagnum og eitt friðskjól, har føroyingar stillførir kundu rækja sítt trúarlív.

- Fólkakirkjan hevur verið rúmlig og átt pláss fyri øllum. Tað er ta rúmligu fólkakirkjuna, ið vit nú hava flutt undir føroyskt málsræði. Mín vón er, at kirkjan framhaldandi fer at hava orku og dirvi at boða kristna boðskapin á ein livandi, viðkomandi og tíðarhóskandi hátt. Verður boðanarfrælsið nýtt til at spíska boðskapin, bjóða okkum av, eggja okkum til, seta spurnartekn við okkara sjálvgóðsku og regluliga minna okkum – kanska serliga okkum, ið sita í valdum umboði – á okkara skyldur mótvegis okkara medmenniskjum, fáa vit eina spennandi fólkakirkju, segði Jóannes Eidesgaard í sínari røðu.

# Sjálvboðin starvsfólk

FÓLKAKIRKJAN
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Hans Jacob Joensen ávarar ímóti at løna kirkjutænarum í Føroyum. Hetta hevði helst ført við sær hægri kirkjuskatt. Umframt at røða um bíbliutýðingar, segði Hans Jacob Joensen, bispur, m.a. at hann hevur lagt dent í arbeiðinum við at gera nýggja føroyska bíbliutýðing, at hetta arbeiði skuldi vera ólønt. Hann vísti á, at hóast hann segði seg ivast í, um sjálvboðið arbeiði eisini fer at verða brúkt í føroysku kirkjuni í framtíðini, so segði hann seg vóna hetta.

Í Danmark eru flest øll størv í kirkjuni lønt, meðan hetta í stóran mun er sjálvboðið í Føroyum. Bispur vísti á, at ein samanbering frá 1994 vísti, at stórur munur er á kirkjubúskapunum í Føroyum og Bornholm – tvey øki, ið annars eru lík í fólkatali. Á Bornholm eru umleið 20 kirkjur, meðan eini 60 kirkjur eru í Føroyum. Burtursæð frá prestalønum og kirkjugarðsútreiðslum, vórðu einar 12 milliónir krónur nýttar til kirkjuna á Bornholm í 1994, meðan kirkjan í Føroyum kostaði 700.000 krónur í sama tíðarskeiði.

Hans Jacob Joensen vísti á, at tað lutfalsliga eru 3,5 ferðir so nógvar kirkjur í Føroyum enn í Danmark, og tí kann hugsast, at útreiðslurnar til lønir høvdu verið 3,5 ferðir so høgar, um alt kirkjutæanaraarbeiði var lønt í Føroyum. Hetta hevði ivaleyst viðført hægri kirkjuskatt, og hesum ávaraði bispur ímóti.

# Nýtt samstarv

FÓLKAKIRKJAN
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Yvirtøkan merkir ikki slit við ta donsku kirkjuna, staðfesti danski kirkjumálaráðharrin á ólavsøku

Bertel Haarder, kirkjumálaráðharri, segði m.a. í røðu síni í Norðurlandahúsinum, at yvirtøkan av kirkjuni ikki er eitt slit, men ein natúrlig gongd og byrjanin upp á at samstarva á ein nýggjan hátt. Hann rósti bæði teimum føroysku og donsku embætisfólkunum fyri fyrireikingarnar til yvirtøkuna, og lovaði, at danir fara at hjálpa føroyingum við útbúgvingartilboðum, fundarvirksemi og serkunnleika til møguligar lærusakir, um slíkar skuldi komið fyri.

### Grundtvig fegnast

Bertal Haarder skemtaði við at siga, at hann væntaði, at sjálvur Grundtvig sat uppi í himni og vælsignaði yvirtøkuna, tí Grundtvig hevði longu í 1850’unum róð framundir, at føroyskt mál skuldi brúkast í kirkjuligum viðurskiftum. Kirkjumálaráðharrin væntaði eisini, at I.C. Christenen vælsignaði yvirtøkuna úr himninum. Bertel Haarder vísiti á, at Christensen man eiga sín lut í í, at danska fólkakirkjan er skipað, sum hon er í dag, og í síni tíð fekk hann saman við føroysku fólkatingsmonnunum, Patursson og Bærendsen, eitt kompromis um føroyskt kirkjumál. Hetta kundi Løgtingið annars ikki semjast um.